

## Morgunblaðið og Frettablaðið løgd saman

Ísland gjørdist eitt dagblað fátækari seinnapartin í gjár, tá teir báðir kappingarneytarnir, Morgunblaðið og Frettablaðið, gjørdu av at leggja saman, veit netútgávan IceNews at siga. Samanleggingin er ein beinleiðis avleiðing av fíggjarkreppuni, sum hevur elvt til ógvusliga minking í lýsingum og methøgar prísir á avíspappíri. Sambært Morgunblaðnum eru hópuppsagnir væntandi, nú bløðini hava lagt saman. Samanleggingin hevur við sær, at lítil og ongin kapping longur er millum landsfevnandi bløðini í Íslandi, og at støðan tí mest er at líkna við dagblaðsmonopol, siga eygleiðarar.



# Foreldrini út í skúlarnar

**Hesaferð skulu foreldur velja umboð til skúlastýrið sama dag og stað sum til kommunuvalið tann 11. november**

SKÚLAMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Mánadagin skulu øll foreldur at skúlabørnum hyggja í botnin á skúlataskunum hjá børnunum. Tí har liggur ein lítil faldari um skúlastýrisvalini, sum verða hildin saman við kommunuvalunum tann 11. november.

Skúlastýri eru í hvørjum sjálvstøðugum skúla í landinum. Í stýrunum eru millum annað umboð fyri foreldrini, og tað eru hesi umboð, sum skulu veljast nú.

Tað hevur verið torført at motivera foreldrini til skúlastýrisvalini. Tí hava myndugleikarnir hesaferð roynt at bøta um áhugan við at avgreiða valið sama dag og stað sum kommunuvalið. Ein onnur broyting er, at foreldur nú skulu vátta foreldramyndugleikan á sjálvum valstaðnum, og ikki skrivliga til skúlan fleiri vikur undan valinum.

### Hvør hevur valrætt?

Men fyrst mugu foreldrini tó kanna, um tey standa á listanum yvir foreldur, sum hava valrætt. Hetta verður gjørt á skúlanum, har barnið gongur – antin við sjálvi at møta upp ella við at ringja til skúlan. Hesir listar liggja frammi frá týsdegnum 21. oktober, hetta er beint aftaná heystfrítíðina, og tvær vikur fram.

Tey, sum hava valrætt og vælbæri eru foreldur, sum hava foreldramyndugleika yvir børnunum.

### Uppstillingarfundur

Síðst í oktober verða uppstillingarfundir úti á skúlunum, har fólk kunnu bjóða seg fram. Eina viku seinni, ella 4. november, skulu uppstillingarlistarnir vera lidnir.

# Kjakarar í leysari luft

**Hóast tey bæði mest vitjaðu kjaktorgini eru latin aftur, eru føroyskir internetkjakarar ikki heimleysir í cyper-space. Teir hava longu stovnað nýtt kjakstað á netinum.**

KJAKMENTAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Óivað hava tey bæði mest vitjaðu føroysku kjaktorgini á internetinum seinastu árini verið Kjak.fo og Kvinna.fo. Men nú eru bæði kjaktorgini latin aftur, tí ávísir kjakarar ikki dugdu sær hógv.




Heimsíðan hjá blaðnum Kvinna boðar í dag frá, at kjakið er niðurlagt. Grundgevingin er soljóðandi: "Av tí at nakrir kjakarar ikki respekteraðu reglurnar fyri kjakið, er kjakið niðurlagt. Tað gjørdist tíverri ov tíðarkrevjandi at umsita." Sosialurin hevur í tveir dagar roynt at fáa orð á stjóran á Kvinnu, Lenu L. Mohr, men tað hevur ikki eydnast enn.

Kvinnukjakið letur aftur bert fáar dagar eftir, at Dimmalætting lat kjaksíðuna Kjak.fo aftur av somu orsøkum. Síðan hevur Kjak.fo verið lýst til sølu á uppboðsøluni loppan.fo.

Men neyvan verður nakar áhugaður keypari, tí fólkini handan kjaksíðuna hava longu sligið seg niður aðrastaðni á netinum, nevniliga á heimasíðuni www.kjak.org. Handan hesa heimasíðuna finna vit navnið Kult v/ Dan Thomsen.



## INPACT styrkir um leiðsluna

**Umframt Jógvan Amonsson eru nú tríggir aðrir stjórar og eigarar í grannskoðarafyritøkuni INPACT**

VINNA
*Tíðindaskriv*

Grannskoðaravirkið INPACT er umskipað og hevur nú fýra løggildar grannskoðarar bæði í leiðsluni og sum eigarar. Av teimum fýra eru tveir statsautoriseraðir grannskoðarar.

Umframt Jógvan Amonsson, sum hevur verið einsamallur stjóri síðani 2000, eru nú: Fróði Sivertsen, Jógvan Joensen og Heini Thomsen stjórar og eigarar.

- Slík umskiping hevur til endamáls at styrkja bæði leiðsluna og arbeiðið í gerandisdegnum fyri at veita kundum okkara eina enn betri tænastu. Við tveimum statsautoriseraðum, tveimum løggildum og fýra skrásettum grannskoðarum, umframt fleiri við viðkomandi útbúgvingum, er INPACT í fremstu røð at loysa verandi og komandi avbjóðingar innan kjarnuøkini roknskap, grannskoðan, skatt og ráðgeving á hægsta tænastustigi, sigur Jógvan Amonsson. Hann leggur afturat, at víðkaði leiðslubólkurin gevur størri rásarúm í mun til í dag, og kundarnir fara at merkja hetta við betraðum samskifti, styttri atgerðartíð og harvið – sum heild - einum hækkaðum tænastustigi.